# Løgfrøði og politikkur hvør sítt

**Jógvan Páll Lassen, advokatur, heldur, at tað er skeivt av politikarum av bíleggja løgfrøðiligar grundgevingar og notatir til at stuðla undir politiskar grundgevingar**

POLITIKKUR OG LØGFRØÐI
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Sjúrður Skaale, stjórnmálafrøðingur, framførdi um vikuskiftið, at "advokatar eru vorðnir eitt slag av heksadoktarum í føroyskum politikki," tí teir verða brúktir av politikarum til at skriva sokallað "løgfrøðilig notatir" til politiskar málsviðgerðir. Jógvan Páll Lassen, advokatur, heldur tað vera skeivt, um advokatar lata seg brúka til hetta endamálið.

- Um advokatar lata seg brúka fyri at fremja eina politiska linju, so er tað skeivt í mínari verð. Tá kann mann neyvan standa inni fyri tí, sigur Jógvan Páll Lassen, advokatur.

Eitt ítøkiligt dømi er málið um uttanríkispolitisku heimildirnar, sum Sjúrður Skaale vísir á. Jógvan Páll Lassen sigur, at hetta málið hevur onki við jura at gera. Men kortini hava politikarar brúkt løgfrøðingar í málinum.

- Hatta málið hevur onki við jura at gera. Tað snýr seg um reinan politikk. Løgfrøðin í hasum málinum kann ikki roynast í einum dómstóli. Hatta er eitt politiskt mál. Um løgmaður hevur gjørt eina avtalu við danska forsætisráðharran, so er tað grundarlagið. Hatta hevur onki við jura at gera, sigur Jógvan Páll Lassen, advokatur.

- Tað er ikki í lagi at brúka juridisk notatir í sambandi við politikk, sigur Jógvan Páll Lassen.



*- Mann er á tunnum ísi, um mann brúkar juridisk notatir í sambandi við politikk, sigur Jógvan Páll Lassen, advokatur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

An international study programme in Denmark is only a click away!

See www.academy.ats.dk for starting dates and further information

- Multimedia Design and Communication
- Building Technician
- IT and Electronics Engineer
- Chemical and Biotechnical Science

Programmes are offered both in English and Danish

Academy of Professional Higher Education
Aarhus Technical College
Denmark

Sølufólk til nýggjan handil

Maria Poulsen
letur upp nýggjan handil

Handilin fer at hava Føroya størstu framsýning av baðirúmsmøblum og øllum, sum har til hoyrir. Dentur verður lagdur á, at baðirúmið ikki longur bara er eitt funktionelt rúm, men heldur eitt rúm, har dygd og lívsgleði koma til sjóndar. Handilin fer at gerast leiðandi innan baðirúmsinnbúgv í Føroyum.

Tað setur krøv til starvsfólkið
Tú kemur, í samstarvi við onnur, at taka tær av einum spennandi og fjøltáttaðum handli. Tú fært møguleika til at hjálpa og leiðbeina kundum okkara og at keypa vørur heim. Samstundis fært tú ábyrgd og ávirkan at menna handilin. Starvið kann røkjast av kvinnu ella manni.

Tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur:
- Royndir innan handil
- Royndir innan køkar, HVS, innbúgvi ella líknandi
- Fyrikomandi, nærlagdur, íðin, sjálvstøðugur og kreativur
- Skilur týdningin av góðum handverki, góðsku og góðari kundarøkt
- Ella annað ið tú heldur er ein fyrimunur

Afturfyri bjóða vit:
- At tú verður lærd/ur upp í okkara vøruúrvalið
- At tú fært eitt spennandi starv við nógvum møguleikum
- At tú fært góðar samstarvsfelagar í góðum fakligum arbeiðsumhvørvi
- Ávirkan á tín egna arbeiðsdag.
- Eina løn í samsvarar við tín førleika
- Stutt sagt eitt spennandi starv í einari fyritøku, í støðugari menning

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skal verða innkomin seinast 3. juni til:

P/F Maria Poulsen
Smyrilsvegur 7
Postboks 182
FO-110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja tel. 312 000 og tosa við Kristian á Dul, stjóra, kd@mariapoulsen.fo

pf Maria Poulsen & Co.







